# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 29. september 2009


## Tjaldur-StÍF 32-25 (18-13):

# Meistararnir løgdu hart út



**Tjaldur greiddi sín setning uttan nakað hóvasták, tá tær í fyrsta umfarinum sendu StÍF vestur um Skálafjørðin við ongum**

### Har var eingin slingur í valsinum, tá Tjaldur tók fyrstu fetini hetta kappingarárið




Jákup Mørk

Tað var annars við spenningi, at Tjaldur tók ímóti StÍF mánakvøldið.

Sum meistarar er eingin ivi um, hvar Tjaldur hevur sett sær málið fyri komandi hondbóltsveturin, og longu fyrsta umfarið var talan um veruliga styrkisroynd.

StÍF hevur nevnliga styrkt sær munandi um hópin í ár, har tríggir rumenskir spælarar nú eru lagstar afturat teimum føroysku, har nakrar teirra seinnu árini hava ment seg til at gerast profilar í føroysku kappingini.

Men tað gjørdist ikki hesaferð, at StÍF skuldi bjóða Tjaldri av. Fyrsta korterið í Runavík leikaði rættiliga javnt á, men tá Tjaldur so leyp avstað, hugdu tær ongan tíð aftur um bak.

Sum ikki einaferð, so var tað við stórspæli frá Adinu Petrea, at Tjaldur trumlaði mótstøðuna niður, og tá ta løtuna, har tær veruliga løgdu sjógv millum seg og StÍF, var nýggja Cornelia Rimu eisini væl koyrandi.

Hjá StÍF er Adriana Dobra enn ikki heilt til teiðar at spæla, men Roxanna Bodirlau vísti seg sum ein góðan fong, ið væl kann gera sítt til, at StÍF veruliga telist millum avbjóðararnar, tá vit komu longur út á kappingarárið.

## FAKTA

**Tjaldur-StÍF 32-25 (18-13)**
**10 min:** 4-5
**20 min:** 9-9
**40 min:** 23-17
**50 min:** 28-21
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 14(1), Annika Thomsen 5, Cornelia Rimbu 5, Sarah Ann B. Thomsen 3, Heidi Sevdal 2, Marinela Patru 2, Elinbjørg Hammer 1
**StÍF:** Roxanna Bodirlau 11(3), Rebekka Justinussen 5, Bára Berthelsen 4, Fríðrunn B. Danielsen 2, Ásgerð Káradóttir 2, Rósa Johansen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 1, StÍF 4
**Útvísingar:** Tjaldur 3, StÍF 1
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

### Hondbóltsstøður

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 33 | 19 | 14 | 2 |
| 2 Tjaldur | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 32 | 25 | 7 | 2 |
| 3 Neistin | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 25 | 21 | 4 | 2 |
| 4 VB | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 21 | 25 | -4 | 0 |
| 5 StÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 25 | 32 | -7 | 0 |
| 6 VÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 19 | 33 | -14 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 32 | 25 | 7 | 2 |
| 2 VÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 29 | 23 | 6 | 2 |
| 3 Neistin | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 27 | 26 | 1 | 2 |
| 4 H71 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 26 | 27 | -1 | 0 |
| 5 KÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 23 | 29 | -6 | 0 |
| 6 Kyndil | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 25 | 32 | -7 | 0 |

# Símun staðfesti stórsigur

### Føroyski landsliðsspælarin í Keflavík skoraði tvey tey síðstu málini, tá ið Keflavík endaði kappingarárið við at vinna 6-1 á ÍBV




Jákup Mørk

Seinasta umfarið í íslendsku landskappingini, Pepsideildini, varð spælt um vikuskiftið. Símun Samuelsen og Keflavík høvdu vitjan av ÍBV úr Vestmannaoyggjunum.

Keflavík vann 6-1, og Símun Samuelsen, sum var á vøllinum alla tíðina, skoraði tey bæði seinastu heimamálini – í 82. og 84. minutti.

Enn eina ferð eydnaðist tað FH av Hafnafirði at vinna meistaraheitið. FH vann 51 stig, KR 48, Fylkir 43, Fram og Breiðablik 34 og Keflavík endaði á sætta plássi við 33 stigum. Stjarnan fekk 26 stig, Valur 25, Grindavík og ÍBV 22. Úr bestu deildini fluttu Þróttur við 16 stigum og Fjölnir við 15 stigum.



**Símun Samuelsen er væl fyri undan teimum báðum seinastu landsdystunum hjá Føroyum í ár**

# Meistaravika

### Bæði í kvøld og í annaðkvøld eru nógvir dystir á skránni í Champions League




Jákup Mørk

Talan er um næsta umfar í bólkaspælinum, og sum vant er onkur uppgerð millum veruliga stórfeløg á skránni. Ikki minst man spenningurin verða stórur á Allianz Arena í morgin, tá Bayern München tekur ímóti Juventus, meðan tað við føroyskum eygum kanska er eyka áhugavert at vita, hvussu leikur fer, tá Spoel Nicosia tekur ímóti enska Chelsea.

### Dystirnir hetta umfarið eru annars hesir:

**Týskvøldið**
**Bólkur E**
Fiorentina-Liverpool (3+)
Debrecen-Lyon

**Bólkur F**
Rubin Kazan-Inter (TV2 Sport)
Barcelona-Dynamo Kiev (TV2 Sport)

**Bólkur G**
Rangers-Sevilla
Unirea Urziceni-Stuttgart

**Bólkur H**
Arsenal-Olympiakos
Alkmaar-Standar Liege

**Mikukvøldið**
**Bólkur A**
Bordeaux-Maccabi Haifa
Bayern München-Juventus

**Bólkur B**
CSKA Moskva-Besiktas
Manchester Utd-Wolfsburg (TV2 Sport)

**Bólkur C**
Milan-Zürich
Real Madrid-Marseille (3+)

**Bólkur D**
Porto-Atlético Madrid
Apoel Nicosia-Chelsea